# BMW styttir jólaferiuna hjá starvsfólkunum

**EFTIRSPURNINGUR** Til tess at nøkta eftirspurningin hava fleiri týskir bilframleiðarar sæð seg noyddar at stytta um jólaferiuna hjá starvsfólkum sínum.




Snorri Brend

Tað plagar annars at vera Kina, sum fer avstað við bróðurpartinum av søluni.

Men í ár er leikluturin broyttur, og eftirspurningurin júst úr Kina merkir nú, at fleiri av størstu framleiðarunum í Týsklandi hava verið noyddir at økja um arbeiðstíðina.

Bilframleiðararnir siga, sambært Financiel Times, at teir fara at leggja stilt eitt stutt bil á jólum, ella snøgt sagt arbeiða seg ígjøgnum jólafrítíðina, fyri at kunna nøkta tann økta eftirspurningin.

Størsti framleiðarin av luksusbilum, BMW sigur, at ein fer at lata verksmiðjurnar í Dingolfing og í Leipzig aftur jóladag, og taka arbeiðið uppaftur einaferð millum 26. desember og nýggjársaftan.

Eisini týskt-framleiddi bilurin, Opel, hjá General Motors, er so væl umtóktur, at jólaferian hjá starvsfólkunum er stytt við eini viku á øllum verksmiðjunum. Hetta sama ger seg eisini galdandi hjá Mercedes og Volkswagen.

BMW væntar at fáa eina metsølu av bilum í ár - 1,4 mió bilar. Økti eftirspurningurin er ein stór broyting frá 2008, har kreppan fekk eftirspurningin at hvørva frá einum degi til hin.

Bilmarknaðurin í Vestureuropa er, hóast økta eftirspurningin, ikki rokkin sínum hægsta máli enn. Samlaða sølan í ár verður helst eini 5,6 prosent lægri enn í 2009 í økinum.

# Ekspertar í jólagávum




Ein av størstu elektronikhandlunum í landinum er Expert í SMS, sum hevur alt frá smáum oyramikrofonum til 55" ´flatskermssjónvarp.

Expert er ein handil við so at siga øllum, sum hevur við elektronik at gera. Handilin hevur eina umfatandi vøruskrá við elektroniskum vørum í øllum prísklassum sum t.d. eru flatskermssjónvarp í flestu støddum á goymslu frá 55" niður í 32". Eisini ber til at bíleggja aðrar støddir, sigur Høgni Zachariasen, handilsleiðari í Expert.

Expert hevur eisini alt frá Bose – heilt frá smáum oyramikrofonum til tey stóru Lifestyle surround anleggini eins og Panasonic anlegg, DVD-spælarar og ghettoblastarar.

Eisini DVD-filmar og øll telduspøl sum t.d. Playstation 3 og Nintendo WII, teknifilmar, fótbóltsspøl og ikki minst fløgur, sum handilin kanska er best kendur fyri – bæði føroyskar og útlendskar..

Farteldur fáast í nógvum ymiskum prísklassum, eins og útgerð til teldur. Eisini Canon og Nikon myndatól og Panasonic og Canon videokamera. Fartelefonir fáast í ymiskum príslegum eins og t.d. iPhone 4, Apple iPad, iPod Nano og iPod Touch.

Høgni Zachariassen sigur, at sum liður í at kunna bjóða kundunum bestu tænastu og vøruúrval online, eisini aftaná vanliga upplatingartíð, hevur Expert eina e-handilsloysn til sínar kundar, har tað ber til at bíleggja sær vørur umvegis internetið.

Vit hava fult hús av jólagávuhugskotum, sigur Høgni Zachariasen, handilsleiðari í Expert, sum bjóðar øllum vælkomnum inn í Expert í SMS.